## Krónan fer í søguna

Íslendska krónan er ov lítil og óstøðug sum sjálvstøðugt gjaldoyra, og tí fer hon í søguna um nøkur ár. Tað heldur Sigurður Einarsson, sum er nevndarformaður í Kaupting Bank. Við Ritzau sigur hann, at íslendski búskapurin er ov lítil til at liva við einum so óstøðugum gjaldoyra, og tí væntar hann, at íslendingar fara at fáa sær evruna sum gjaldoyra um nøkur ár. Tað sama sigur stjórin í íløgufelagnum FL Group, Hannes Smárason, við Ritzau.

## Ein long longa

Dagliga arbeiðir norðmaðurin Mareno Nauste sum snikkari, men í frítíðini er hann ein sera íðin stuttleikafiskimaður. Nú um dagarnar var hann ein túr á fjørðinum í Eresfjord í Romsdal, og har fekk hann eina yvirvaksna longu. Hon vísti seg at vera 1,70 metur long og vigaði 54 pund. Hann gjørdi av at leggja hana í salt, og nú hevur hann hongt hana upp. Longan er kortini ikki tann størsta, sum er fingin í Noregi. Tann størsta vigaði 78 pund.



# leggjarum



*Sammi Isaksen og bróðurin, Stig Isaksen, selja fyrsta floks føroyskan línufisk á danska marknaðinum. Fiskurin verður bílagdur um heimasíðuna hjá felagnum ella um telefonina og síðan koyrdur til dyrnar hjá fólki*

og eitt skifti var hann grannskoðari í Føroyum. Eitt tíðarskeið sat hann sum yngsti maður í nevndini hjá Kjølbro. Í sínari tíð var hann eisini við til at endurstovna Papcon, men í fleiri tey seinastu árini hevur hann búð í Keypmannahavn, har hann hevur havt frálæru í telduskipanum.

Saman við bróðuri sínum, Stig, hava teir stovnað EasyFisk.

Hóast árini ikki eru so ógvuliga mong, hevur Stig Isaksen verið á sjónum tað mesta av einum hálvum mansaldri, og eitt skifti var hann eisini reiðari á línuskipinum Núpi.

### Stig flutti

- Tað, at Stig flutti til Danmarkar, gav okkum skumpið til at stovna EasyFisk, men hetta er eisini ein gamal dreymur, sum er vorðin veruleiki, sigur Sammy Isaksen.

Tá ið hann flutti niður til Danmarkar tíðliga í nítiárunum, hevði hann ein SvF-film við um reina føroyska umhvørvið. Hann hugsaði longu tá um at gangnýta hetta á onkran hátt.

- Hesi árini, eg havi búð í Danmark, havi eg ferð eftir ferð upplivað, at danir, ið smakka føroyska fiskin, spyrja, hvar teir kunnu keypa hann, tí hann er so framúr góður, sigur Sammi Isaksen.

Tað eydnaðist EasyFisk at fáa í lag samstarv við fiskavirkið Norðfra í Norðdepli, sum hevur vælkenda fiskabilin í Føroyum, og síðan hevur virksemið á danska marknaðinum hildið fram.

# Pan Fish tók sløk 3.000 tons av laksi á Oyndarfirði í ár

**Marnar Dam, rakstrarleiðari hjá Pan Fish í Oyndarfirði, sigur, at felagið hevur aling á fleiri støðum kring landið - við ymiskari útseting av smolti og tøku av vaksnum fiski. - Tann stóra tøkan í ár verður í Haldarsvík og á Veðranesi, sigur hann**

ALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Pan Fish í Oyndarfirði tóku teir sløk 3.000 tons av laksi í fjør. Teir byrjaðu tøkuna miðskeiðis í fjør summar, og síðst í november var hon liðug.

Fiskurin varð kruvdur og pakkaður á Vestsalmon í Kollafirði.

Í løtuni liggur aliøkið í Oyndarfirði stilt og við ongum fiski.

### Smolt í apríl

Sambært nýggju kunngerðini um aliøkini, skulu hesi liggja still í minsta lagi í tveir mánaðir, eftir at tøkan er liðug, til fiskur verður settur útaftur.

Marnar Dam, rakstrarleiðari hjá Pan Fish í Oyndarfirði, sigur, at hetta passar teimum væl, nú eingin fiskur kortini verður settur útaftur fyrr enn fyrst í apríl mánaða.

Hann sigur, at ætlandi verða eini 750.000 laksasmolt sett útaftur í aliringarnar á Oyndarfirði.

- Nú økið kortini liggur stilt, eru vit farnir í holt við at taka upp gomlu fortoyningarnar og skifta tóverkini út, sigur Marnar.



*Í løtuni hevur Pan Fish ongan fisk á Oyndarfirði. Nú verða fortoyningarnar tiknar upp og tóverkini skift. Men tíðliga í apríl fer felagið at seta 750.000 laksasmolt útaftur í ringarnar á fjørðinum Mynd: Henrik Solberg*

### Fýra aliøki

Í løtuni virkar Pan Fish í Føroyum á fýra ymiskum støðum í senn kring landið - á Oyndarfirði, Kollafirði, Veðranesi og Haldarsvík.

- Tað er soleiðis, at tíðin frá tí, at fiskur verður settur út, til tøka kann fara fram, er millum eitt ár og einar 17-18 mánaðir.

Marnar Dam sigur, at tá ið Pan Fish soleiðis hevur aling á fleiri støðum - við ymiskari útseting, kann felagið upp á skift taka fisk á hvørjum ári.

- Vit tóku eisini nakað í Haldarsvík í fjør, men tann stóra tøkan var sum nevnt í Oyndarfirði. Í ár byrjar tøkan aftur í Haldarsvík og heldur fram á Veðranesi. Tilsamans verður talan helst um nakað meira enn 3.000 tons í ár, leggur hann aftrat.

### Heldur fram

Rakstrarleiðarin í Oyndarfirði vísir á, at á várið 2005 varð fiskur settur út á Oyndarfirði, heystið 2005 í Haldarsvík, várið 2006 á Veðranesi - og síðsta heyst setti Pan Fish fisk út Vesturi undir síðu sunnanfyri Kollafjørð.

- Í vár verður fiskur so settur útaftur á Oyndarfirði, og soleiðis verða útseting og tøka at halda fram, sigur Marnar Dam.



*Teir hava nógv at tosa um, nú nýggjur alibátur - ein tvíkilja - verður partur av virkseminum hjá Pan Fish í Oyndarfirði. Rakstrarleiðarin, Marnar Dam, stendur í miðjuni og prátar hesa løtu við stjóran í KJ-Hydraulik, Ólav A. Olsen*

*Mynd: Sofus Gregersen*